Óli Egilstrøð

Úr Eiðis søgu

Kemur í bókabúðirnar 5. juni

Kostnaður kr. 385,-

Eksotiskur tónleikabólkur úr Íslandi

»Nomwe Marimba« nevnist tónleikabólkur úr Íslandi, sum verður at hoyra í Havn um vikuskiftið

TÓNLEIKUR

Ein spennandi og eksotiskur tónleikabólkur úr Islandi kann í komandi vikuskifti upplivast í SMS og Margarinfabrikkini.

Talan er um eitt slagverkorkestur úr Húsavík við sjey ungum fólkum, sum nevna seg »Nomwe Marimba«. Tað serliga við hesum orkestrinum er, at tónleikararnir spæla afrikanska tónleik á traditionel ljóðføri, sum eru gjørd og keypt í Zimbabwe.

Umframt at spæla marimba, mbira (tummilfingraklaver) og trummur syngja og dansa tey eisini. Við øðrum orðum eru talan um heilt serlig tónleika uppliving.

»Nomwe Marimba« kann upplivast á torginum í SMS fríggjadagin 28. mai kl. 17.00 og í Margarinfabrikkini sunnudagin 30. mai kl. 20.00 har tey fáa vitjan at tveimum staðarbundnum rockbólkum – Speaker og 48 pages – sum annars skulu til Island at spæla í juli 2004.

el

Epilepsi og kynslív

Hósdagin verða fyrilestrar um epilepsi og kynslív, sum Epileptikarafelag Føroya skipar fyri

FYRILESTUR

Epileptikarafelag Føroya skipar fyri fyrilestri á Hotel Hafnia komandi hósdag 3. juni kl. 15.00, har Bjarki á Rógvi Hansen fer at tosa um epilepsi og kynslív, »Ketogen diæt«, sum er ein kostviðgerð fyri fólk við epilepsi og teir nýggjastu møguleikarnir við kirurgiskari viðgerð.

Bjarki á Rógvi er yvirlækni á neurologisku deildini á Ríkissjúkrahúsinum og hevur eisini havt fleiri føroyingar í viðgerð har. Hann er hálvur føroyingur og hevur tað tí verið sera lætt at fáa hann hendanvegin. Hann hevur verið fleiri ferðir fyrr í Føroyum og hildið fyrilestrar og hava teir verið sera væl umtøktir.

– Eisini eru vit sera spent upp á tað seinna innleggið, sum Ellids Kristensen fer at hava, hon er M.D. yvirlækni, klinisk lektor, leiðari á Sexological Clinic á Ríkissjúkrahúsinum og kemur hon at tosa um varandi brek og kynslív. Hesin fyrilestur halda vit burdi verið viðkomandi hjá nógvum fólkum í Føroyum. Brekini eru ógvuliga ymisk sjálvandi, men hon tosar ógvuliga breitt um evnið. Hon hevur eisini skrivað ein bók um »Sex og psyke«, sum er ógvuliga væl umtókt, sigur Randfríði Sørensen, sum er forkvinna í Epileptikarafelag Føroya.

Fyrilesturin er ætlaður øllum fólki við varandi breki ella sjúku og teimum, fólki í sjúkrahúsverkinum, heimarøktini, eins og stuðlum undir stuðulsfólkaskipanini o. l. lærarum, pedagogum, teimum, ið arbeiða á sambýlum v. m., eins og øll, ið hava áhuga í einum slíkum fyrilestri.

el

Pakkaferðir til London

Fráferðir eru 11., - 18. og 25. juli

Fyri hvønn í tveymanskamari

6.985,-

Einakamar: Kr. 8.650,-

Gist verður á fralíka 3★★★ Queen Park Hotel í Bayswater. Ikki langt frá Hyde Park og Oxford Street. Vælkendi Portobello Road leygardags-marknaðurin í Notting Hill Gate er bert fáar minuttir til gongu frá hotellinum.

www.queensparkhotel.com

Íroknað ferðina er:
Flúgving við Atlantic Airways Vagar - Stansted og aftur • Flutningur frá Stansted við bussi og aftur. Við hjálparfólki á staðnum • Gisting í 7 nætur á Queens Park Hotel við morgunmati • Halvdags útferð: London City Tour við skandinaviskum ferðaleiðara • Hálvdagsútferð: Hampton Court Palace & Gardens við skandinaviskum ferðaleiðara • Ein av kendu West-End songleikunum, mánadag ella týsdag við flutningi til/frá hotellinum og skandinaviskum ferðaleiðara.

Ferðatrygging er ikki íroknað prísin.

SANSIR 355 355

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

Kanning um fólkaskúlan á veg

– Eg haldi tað vera eina skyldu at kanna nærri føroyska fólkaskúlan, tí tað er væl hugsandi, at negativu tendensirnir í Danmark eisini eru at finna í Føroyum, sigur mentamálaráðharrin. Enn fyriliggur tó eingin ítøkilig kanning

FÓLKASKÚLIN

Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Í fyrradagin kastaði Sosialurin ljós á nýggja OECD kanning um danska fólkaskúlan, sum avdúkaði álvarsamar fakligar og sosialar trupulleikar hjá donsku næmingunum. Í gjár metti næstformaðurin í Føroya Lærarafelag, Magnus Tausen, at kanningar og skipað gransking av føroyska fólkaskúlanum eru átroðkandi, og mentamálaráðharrin tykist eisini taka undir við hesum.

– Vit eiga at finna fram til, um vit veruliga fáa nóg mikið fyri tær 215 milliónirnar, skúlin kostar, og tí er ætlanin at skipa fyri nýggjum kanningum um føroyska fólkaskúlan, sigur Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri

Skylda

Jógvan á Lakjuni er sjálvur lærari, og hann hevur fyrr nevnt fólkaskúlan at vera ovarlaga á raðfestingarlistanum. Hann metir OECD kanningina um danska fólkaskúlan vera áhugaverda og hugvekjandi, og tá vit eru undir somu skipan í Føroyum, vil Jógvan á Lakjuni eisini kasta ljós á føroysku fólkaskúlanæmingarnar.

– Eg haldi tað vera skylda okkara at kanna næmingarnar og skúlan nærri, tí tað er væl hugsandi, at negativu tendensirnir í Danmark eisini eru at finna í Føroyum, sigur mentamálaráðharrin. Tí ynskir hann fyrst og fremst at seta seg inn í, hvør kanning hevði hóskað best til føroysk viðurskifti, og hvussu ein slík skal gerast.

– Hetta er nýtt, og eg kann ikki siga nakað ítøkiliga um, nær og hvussu, men hetta er avgjørt eitt mál, vit ætla at arbeiða við og ogna okkum meiri innlit í, sigur Jógvan á Lakjuni. Hann vísir í hesum høpi eisini á samtykt í samgonguskjalinum at endurskoða og eftirmeta fólkaskúlalógina og undirvísingina.

Hægri krøv

– Ein møguleiki eru sokallaðu PISA kanningarnar, OECD hevur nýtt, har 4500 danskir næmingar í eini fakligari roynd verða spurdir um ymiskt, men enn er sum sagt ikki greitt, hvussu vit skulu fara til verka, slær mentamamálaráðharrin fast.

Í løtuni eru stig ikki tikin til nakra slíka kanning í Føroyum av myndugleikanum, men fyri stuttum gjørdi miðnámsskúlalærarin Katrin Næss eina kanning við studentaskúlanæmingum um føroyska stavseting.

– Úrslitið var, at føroyskir ungdómar duga alt ov illa at stava, og hetta kann vera ein ábending um, at fakligi førleikin ikki er nøktandi, metir Jógvan á Lakjuni.

Sjálvur er hann ikki í iva um, hvønn vong hann umboðar í sambandi við fólkaskúlan og undirvísingarrákið seinnu árini.

– Rákið hevur verið, at skúlin gerst fríari og fríari, og hetta havi eg ongantíð tikið undir við. Krøvini til okkara næmingar skulu vera hægri, sigur mentamálaráðharrin. Fyri stuttum hevur verið frammi, at næmingar sjálvir kunnu avgera, um teir vilja upp í roynd ella ikki, men hetta heldur Jógvan á Lakjuni vera púra burturvið.

Fólkaskúlin kostar 215 mió.

Jógvan á Lakjuni heldur tað vera hugvekjandi, at júst tann danski fólkaskúlin sær út til at hava ov mong sjúkueyðkenni, tí hesin skúlin er nevniliga sera dýrur samanborið við aðrar fólkaskúlar í granna-londunum. Somuleiðis er føroyski fólkaskúlin sera dýrur, og tí vil mentamálaráðharrin vita, um vit fáa nóg mikið fyri peningin. Jógvan á Lakjuni heldur, at tá danski skúlin er so kostnaðarmikil og samstundis relativt illa fyri, er okkurt galið, og so mugu vit eisini fáa kannað, um somu trupulleikar gera seg galdandi her á landi.

– Seinastu 6-7 árini er játtanin til føroyska fólkaskúlan hækkað úr 130 til 215 milliónir, og játtanin tykist bert hækka, sigur Jógvan á Lakjuni. Hann vísir á, at vøksturin á fólkaskúlajáttanini í størstan mun er orsakað av lønarhækkingunum, og hóast alt ikki kann gerast upp í pengum, vil mentamálaráðharrin vita, um vit veruliga fáa nóg mikið fyri tær 215 milliónirnar, skúlin kostar.

Føroyingum dáma væl Italia

Fyrr í ár fór Atlantic Airways undir at bjóða føroyingum møguleikan at fara til Italia at ferðast, og undirtøkan fyri hesum tiltaki hevur verið stak góð

FERÐING

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Teir mongu føroyingar, sum á hvørjum ári leita sær suður í heitari lond, hava sum oftast vitjað á Mallorca, Gran Canaria, Tenerife ella einari av griksku oyggjunum. Hinvegin eru tað ikki so mong, sum hava lagt leiðina til Italia. Síðani fyrr í ár hevur Atlantic Airways bjóðað pakkaferðir til styvlalandið, og undirtøkan hevur verið sera góð.

Nógvir bólkar

Kent Christensen, marknaðarstjóri hjá Atlantic Airways, sigur, at tey eru stak væl nøgd við gongdina higartil. Tilboðini til Italia hava verið væl móttikin millum føroyingar, og heilt nógv hava longu verið á vitjan í landinum. Millum annað hava fleiri bólkar keypt hesa pakkaferð, og til dømis var ein bólkur upp á ikki færri enn 43 fólk í Italia herfyri, sigur Kent Christensen.

Tað er í sambandi við leigutúrar, sum Atlantic Airways ger fyri danskar ferðasmiðir, at flogið verður til Italia. Tað vil siga, at danski ferðasmiðurin leigar flogfarið til eina ávísa nøgd av ferðafólki, og so kann Atlantic Airways selja tey tøku plássini, sum eru eftir.

Útboðið víðkar

Higartil hevur verið flogið til Perugia í mið-Italia. Hesin býur liggur í einum øki, har nógv áhugavert er at síggja til gomlu italsku mentanina. Eisini er møguleiki fyri at gista á eitt nú vinbóndagørðum, og tað hevur víst seg, at serliga millum tilkomið fólk hevur áhugin fyri hesum ferðum verið stórur, sigur Kent Christensen.

Í næstum fer Atlantic Airways eisini at flúgva til ein annan italskan bý, Ancona, og tá fara ferðatilboðini at víðkast. Av tí at Ancona liggur nærheindis sjónum, verða tað nú eisini bjóðaðar pakkaferðir til familjur, sum hava hug til at fara á baðifrítíð, sum tað verður rópt. Tað vil siga, at gist verður nærheindis sjónum á barnavinarligum gistingarhúsum.

Tilboðini upp á pakkaferðir til Italia hjá Atlantic Airways verða á skránni heilt fram til oktober mánaða. Kent Christensen, marknaðarstjóri hjá Atlantic Airways, sigur, at tey vilja fegin geva føroyingum ein øðrvísi uppliving, og tey halda Italia verða eitt upplagt ferðamál, tí tað hevur aldrin verið fyrstavalið hjá føroyskum ferðafólki.